# BitStova um felags skrá til staðsettar dátur

**Hvussu fáa Føroyar eina felags atkomiliga skrá yvir allar staðsettar dátur og talgild kort? Tann spurningin fer Bitland at viðgera í einum almennum tiltaki í morgin, 1. desember. BitStovan er skipað sum eitt tiltak við fyrilestrum**

FELAGS SKRÁSETING

Staðsettar dátur eru upplýsingar, ið knýta seg at einum ávísum stað. Tað kunnu vera upplýsingar um bústaðir, vatnleiðingar, fiskimið, staðarnøvn, kirkjugarðar og mangt annað. Í Føroyum eru hesar upplýsingar spjaddar. Almennir stovnar og privat feløg hava hvør í sínum lagi nógvar dátur, men enn finst einki yvirlit yvir, hvørjar dátur eru til, og hvør hevur tær um hendi.

Millum fakfólk hevur nógv verið tosað um, hvussu hent ein felags skráseting – eitt yvirlit av tí, sum finst av staðsettum dátum – hevði verið. Almennir stovnar og privat feløg liggja inni við nógvum dátum, sum hava áhuga eisini hjá øðrum brúkarum. Men vit hava ikki enn fingið miðilin, sum kann nýtast til samskiftið til gagns fyri fleiri áhugabólkar.

Uppgávan hjá einstøkum persónum ella stovnum at byggja upp sjálvar dátuskipanirnar er ofta so stór, at tann neyðuga lýsingin, dokumentatiónin av dátunum og eginleikum teirra, verður lopin um. Tað er spell, tí hetta hevur stóran týdning fyri bæði dátueigaran sjálvan og onnur, ið fáast við at skráseta og handfara somu ella líknandi viðurskifti. Vóru upplýsingar tøkar um staðsettu dáturnar, sum til eru, var nógv vunnið.

Bitland skipar tí saman við umboðum fyri Jarðfrøðisavnið, Føroya DátuSavn og Munin fyri eini BitStovu um felags skráseting.

**Endamálið við BitStovuni er at kanna:**

a. um undirtøka er fyri einari felags skrá, herundir handilsligu krøvini hjá brúkarunum fyri at luttaka í skipanini. Luttakararnir skulu útgreina, hvat tey krevja av skipanini fyri, at tey skulu brúka hana,
b. hvussu ein felags skrá kann gerast veruleiki (roadmap), og
c. hvussu ein felags skrá kann fíggjast (bæði íløgur og rakstur)

Um undirtøka er fyri ætlanini á BitStovuni verður miðað eftir, at luttakararnir koma til eina niðurstøðu um, hvussu ætlanin kann gerast veruleiki og fíggjast, umframt at fáa semju um ein arbeiðsleist til at menna skránna.

BitStovan er skipað sum eitt tiltak við fyrilestrum, og til tess hava fyrireikararnir fingið fyrilestrarhaldarar bæði úr Føroyum, Danmark og Norra at legga fram.

# Trýstfløska sprongdist á Brennistøðini á Hagaleiti

**Fríggjadagin var ein spreinging á brennistøðini á Hagaleiti. Orsøkin var ein lítil trýstfløska. Brenniovnurin fekk ikki stórvegis sjónligan skaða í hesum føri, men brenningin mátti steðga í níggju tímar. Trýstfløskur skulu latast inn sum vandamikið burturkast og ikki til brenning**



SPREINGING

Fríggjadagin klokkan 11.52 fekk vaktarmaðurin á brennistøðini á Hagaleiti ein ræsettuligan skelk, tá ein hvøllur brestur var á brennistøðini. Hann var beinan vegin greiður yvir, at okkurt óvanligt var komið í ovnin.

Á eftirlitsskýggjanum sá hann, at bálið var mestsum køvt. Tá hann hugdi út í ovnhøllina, sá hann, at ein av lúkunum á ovninum var sprongd upp og at sótstøv og roykur spríkti út millum samankomingar og lúkur.

Í slíkum føri ræður fyrst og fremst um at fáa tamarhald aftur á brennigini í ovninum. Innfýringin av burturkasti varð steðga, og luftskipanin lagað til útbrenning, so bálið kundi brenna liðugt og ovnurin kólna. Hóast eftirlitsupptøkutólið hevði fingið nakað av skaða, sást tó so frætt, at múrverksklæðingin í ovninum ikki hevði fingið stóran skaða.

Tá ovnurin eftir fýra tímum var kólnaður so frætt, at høvuðslúkan kundi latast upp, kundi staðfestast, at ovnrúmið ikki hevði fingið stórvegis sjónligan skaða. Eisini varð staðfest, at ein sprongd trýstfløska, sum tá var komin fram á seinastu rist í ovninum, var orsøkin til hvølla brestin á middegi.

Eftir at hava kannað lúkur og útgerð varð ovnurin hitaður upp aftur og um níggjutíðina um kvøldið varð aftur brent sum vanligt. Í vikuskiftinum komu tó nakrir steinar av sokallaða múrboganum niður í øskubingjuna, men mett verður, at ovnurin kann vera í drift til næsta ætlaða steðgin um nýggjársleitið.

Orsøkin til brestin var ein sjey litur 200 bar trýstfløska. Fløskan hevur helst verið brúkt til roykkavaraútgerð og hevur helst ligið í einari bingju, sum er ætlað til burturkast, ið skal brennast. Av tí at hitin í ovninum liggur um 1000 stig, brestur fløskan, um trýstið í henni frammanundan brenning bert var nakrar fáar atmosferur, bæði tí at trýstið í fløskuni hækkar og tilfarið viknar av hitanum.

Trýstfløskur skulu als ikki latast IRF sum burturkast, ið skal brennast, men sum vandamikið burturkast.

Fløskur av hesum slag eru væl merktar. Hóast fløskan skrædnaði eftir allari longdini, bar til at lesa allar upplýsingarnar á henni.

# Deyðsmálmur og tekno rokkur í VB-Húsinum

**Føroya besti deyðmálmsbólkur Sic og Føroya besti teknorokkbólkur Side Effect fara leygarkvøldið á pallin í VB-Húsinum.**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*



Sic og Side Effect fara saman at royna at fáa takið á VB-Húsinum at lyfta seg leygarkvøldið. Hetta eru tveir av teimum allar bestu føroysku bólkunum, sum hvør er villari enn annar

Fyrsta fløgan hjá Side Effect skuldi koma út í heyst, men enn er hon ikki komin í handlarnar. So meðan vit bíða eftir fløguni er einasti møguleiki at hoyra bólkin at fara á konsert. Teir hava ikki spælt so nógv hesar seinastu mánaðarnar, men spældu í summar á ólavsøkukonsertini, har teir mundu vera ein tann besti bólkurin.

Side Effect hevur spælt í nøkur ár, og hevur við tíðini funnið sítt egna úttrykk. Við tí sera karismatiska Ludvig Breckmann við mikrofonina, og nokk tí gávuríkasta unga tónleikaforritaranum Brynjolfi á Heygum handan programeringsknøttarnar og við ljómborðið, er eingin ivi um, at VB-húsið fer at gerast eitt pumpandi teknorokk ball.

Sic vóru sera tætt við at gerast besti bólkurin í The Global Battle Of The Bands her fyri, so tætt, at tað einans vóru nøkur fá stig millum Sic, Lama Sea og Marius, sum vann. Sic hevur nýliga verið á konsertferð í Íslandi og hevur verið sera virkin í heyst.

Síðan Sic skiftið út í manningini í vár, er bólkurin vorðin alsamt betur, og eru ein sannur veggur av deyðsmálmi. Dyrnar lata upp leygarkvøldið 3. desember kl. 23, um miðnáttarleitið byrjar konsertin.

Suðuroyingar eru tiltiknir fyri at vera góðir rokkáskoðarar, hetta sást dømi um, tá Sic og The Dreams spældu í TB-húsinum fyri nøkrum vikuskiftum síðan. So kvøldið verður ivaleyst gott.

# Amazonair í Australian Bar

Danski bólkurin hjá føroyska gittarleikaranum Sólbjarti Pæturi Sivertsen, Amazon air bjóðar á heimasíðu síni fjepparum at fáa atgongumerkið við avsláttri tá bólkurin spælir í The Australian Bar í Keypmannahavn fríggjakvøldið.

Tá bólkurin fer á pallin í Australien Bar, er tað við nýggjum ljómborðsleikara, fyrrverandi ljómborðsleikarin er farin til Sveits í lestrarørindum, og ein nýggjur maður er komin í hansara stað.

Á heimasíðuni hjá bólkinum ber til at taka niður eina innbjóðing, at hava við inn á konsertina, við hesi innbjóðing kostar atgongumerkið 30 kr. ístaðin fyri 50 kr. Sí HYPERLINK „http://www.amazonair.net" www.amazonair.net

**nud**